# SOLEIÐIS VERÐUR TÚ SÆDD Í CANNES



*Um tú eitur Angelina Jolie ella Brad Pitt, tørvar tær ikki annað enn at møta upp fyri at koma í allar miðlar*
mynd: polfoto

Í hesum døgum er filmvika í Cannes, her verður avgjørt hvat er hot og hvat er not innan filmídnaðin. Tað er eingin ivi, at hottasta parið í løtuni eru Angelina Jolie og Brad Pitt, allastaðni, ið tey fara renna myndamenn í hølunum á teimum. Men Cannes er á tremur við øðrum stjørnum, og hóast myndamenn taka nógvar myndir, so er altíð vandi fyri at hvørva burtur í mongdini, um tú bert ert ein vónríkur sjónleikari, ið ynskir at gera vart við seg. Tí verða nógvar royndir gjørdar við at lata seg í serligar kjólar og klædningar fyri at onkur skal leggja til merkis til tín. Í ár stendur Sara Forestier fyri tí kanska mest kreativu og samstundis mest sympatisku royndini. Til frumsýningina av Chacun Son Cinema møtti franska sjónleikarkvinnan upp í einum Amnesty International Control Arms kjóla, ið hevði pistólar og patrónir seymaðar á seg.

*Unga franska sjónleikarkvinnan Sara Forestier fekk gjørt bæði vart við eina góða søk og seg sjálva í hesum Control Arms kjólanum*
mynd: polfoto






*Okkara myndaveitarar høvdu ongar myndir av Victoriu, ið smílist, so her er ein meira vanlig mynd av henni.*
Mynd: SaN

## POSH SKELKAR ENSKAR FJØLMIÐLAR

Victoria Beckham ella Posh Spice er í hesi vikuni í USA, har hon fyrireikar seg til, at hon og maðurin David flyta til USA. Á einum túri til handils á Sunset Boulevard í Holywood, skelkaði hon paparazzi myndamennirnar, ið annars eru vanir við eitt sindur av hvørjum. Posh, ið sambært enska blaðnum The Sun ikki hevur somikið sum smílst, síðan hon í 1999 kunngjørdi, at hon var trúlovað við David Beckham, sá veruliga út til at hugna sær, og mitt í øllum flenti hon inniliga. Paparazzi myndamenn vóru skjótir at taka myndir av hesi skelkandi hending, og ensku bløðini keyptu glaðbeint hesar heilt serligu myndir, og skriva nú søguna.

## COMEBACK ELLA PLAYBACK?

Um nakar skuldi verið í iva, so syngur Britney Spears ikki, tá hon í hesum døgum er á síni comeback konsetferð kring USA. Á konsertini í vikuskiftinum í The House Of Blues í Orlando, Florida fekk Britney knappiliga tøkniligar trupulleikar, og ljóðsporið við røddini hjá henni, ið var banda frammanundan, fór at hakka, skrivar tv2..dk. Tann áður so vælumtókta popprinsessan varð somikið illa við av hendingini, at hon mátti venda sær burt. Hóast tøkniligi trupul-



leikin varð loystur beinanvegin, fór Britney skjótt eftir av pallinum, og konsertin varðaði sostatt einans 14 minuttir og ikki 20, sum ætlanin var, veit danska heimasíðan at siga frá.

# BAYWATCH Á GØTUSANDI

Á hvørjum ári fylkist nógv fólk á Gøtusandi tá G!festivalurin verður hildin, men hetta er ikki einasta mentanarhendingin, sum vakra sandstrondin hevur verið partur av. Á Youtube liggja nógv føroysk filmsklipp og eitt av hesum er ein føroysk parodi upp á Baywatch, nevnd Faroese Babewatch. Ein flokkur av ungum monnum spælir intropartin til Baywatch í teirra egnu útgávu á júst Gøtusandi. Tað er LavaLava productions, ið hava staðið fyri framleiðsluni og hetta er annar filmur hjá teimum, frammanundna hevur LavaLava gjørt ræðufilmin Eyðun Returns, ið eisini liggur á Youtube.



*Faroese Babewatch: youtube.com/watch?v=BfRPjVN5sso • Eyðun Returns: youtube.com/watch?v=qMCjfgsSn9s*